# Todi og teir fingu skeld

**– Makan til slíkt kaos er tað langt síðani, at eg havði sæð, segði venjarin Tom Nordlie, tá ið hann hølvaði spælararnar hjá Start av undir venjing á La Manga**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Todi Jónsson og liðfelagarnir í Start fingu ein ordans uppsang frá venjaranum Tom Nordlie undir venjing á La Manga um vikuskiftið.

Blaðið Fedrelandsvennen skrivar, at Nordlie var sera misnøgdur við hugburðin hjá spælarunum, og undir venjingini sunnudagin kallaði hann sínar menn saman og loysti av.

– Eg giti, at tað er trupult at koma í gongd, tá ið tað eru tríggir mánaðir, síðani vit vandu ymisku partarnar á liðnum, men makan til kaos er tað langt síðani, at eg havi sæð, segði Tom Nordlie um spælararnar, sum ikki vóru so hugaðir at halda sínar taktisku skyldir undir venjing og venjingardystum.

– Nú fari eg stramma í. Januar, desember og november hava verið serligi mánaðir, tí vit hava havt nógvar skaðar. Alt hevur verið eitt sindur leysari, men nú er tað liðugt við tí, og vit skulu aftur á gamla lagið aftur, segði hann



*– Eg skal tosa við landsliðsvenjaran aftur í august, men eg eri rættiliga vísur í, at eg havi spælt mín seinasta landsdyst, sigur Todi við Fedrelandsvennen. Sunnudagin fingu Todi og hinir spælararnir í Start eitt ordan skeld frá venjaranum*

**Mangla nógv sum lið**

Start er á venjingarlegu á La Manga, og sunnudagin brúkti venjarin 10 minuttir til geva spælarunum turt uppá.

Venjarin gjørdi spælarunum greitt, at teir mugu lurta eftir venjaranum, teir mugu lurta eftir hvørjum øðrum, teir mugu bíta tennirnar saman, tá ið tað verður kravt nógv av teimum, og teir mugu annars hava ein professionellan hugburð til venjing.

Start-venjarin heldur, at seinasta tíðin hevur verið merkt av nógvum skaðum, men hann hevur hóast alt gott mót.

– Vit eru ikki verri fyri fysiskt nú samanborið við somu tíð í fjør, men sum lið hava vit nógv at arbeiða við, sigur Nordlie við Fedrelandsvennen.

Sambært blaðnum tóku spælararnir orðini frá venjaranum til sín.

**Todi ikki á landsliðið aftur**

Føroyski álopsspælarin Todi Jónsson er við Start á La Manga, og Fedrelandsvennen skrivar, at Todi fer ikki at spæla á landsliðnum aftur. Hetta hevur Todi luftað í føroyskum miðlum, og hóast Føroyar skulu royna seg ímóti sterkum tjóðum longu síðst í hesum árinum, er tað nógv sum talar fyri, at Todi spælir ikki við landsliðnum aftur.

– Eg skal tosa við landsliðsvenjaran aftur í august, men eg eri rættiliga vísur í, at eg havi spælt mín seinasta landsdyst, sigur Todi við Fedrelandsvennen.

– Hevði eg verið 20 og nýggjur á landsliðnum, hevði tað verið nakað annað. Nú má eg prioritera familjuna hægri, sigur hann.

# Juanna í essinum

**Føroyski hevarin hevði lyklaleiklut, tá DM-favorittarnir úr Lyngby vórðu sendar heim við 1-3 tapi**

FLOGBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tvey umfør eru nú leikt av elitu-endaspælinum í donskum flogbólti. Føroyska íkastið á kvinnusíðuni er her Juanna S. Joensen, sum spælir í SK-Aarhus. Og um vikuskiftið var hon rættiliga í fokus.

Mótstøðuliðið vóru DM-favorittarnir úr Lyngby, men tær fingu sjáldan eitt bein til jørðina í dystinum. Við settúrslitunum 17-25, 25-21-21-25, 25-22,15-11, vann SK Aarhus ein tryggan sigur, og tað var ikki minst Juannu at takka. Sum skilst, so spældi føroyski hevarin ein framúr dyst - kanska sín besta í Danmark yvirhøvur - og tí var alla tíðina bit og kraft í álopsspælinum hjá Aarhus.

Fyrsta dystin í endaspælinum taptu Juanna og tær annars við 3-1 fyri Fortuna Odense, og í samlaðu støðuni er SK-Aarhus á fjórða plássinum í kappingini.



*Juanna S. Joensen hevði høvuðsleiklut, tá SK-Aarhus leygardagin vann á DM-favorittunum úr Lyngby*

# Gevandi vitjan

**Í føroyska dómarafelagnum hildu tey seg fáa nógv burtur úr donsku vitjanini um vikuskiftið**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hondbóltsdómarafelagið hevði kring dystin millum H71 og StíF leygardagin skipa fyri ymsum tiltøkum, soleiðis at føroysku dómararnir skuldu fáa sum mest burtur úr, nú tveir danskir toppdómarar vóru á vitjan.

Undan dystinum varð lítil fyrilestur, har teir greiddu frá, hvussu teir vanliga fyrireikaðu seg til slíkan dyst. Hesin fyrilesture var opin fyri dómarum, venjarum og fjølmiðlum, og sum skilst, so var talan um rættiliga áhugaverdan fyrilestur.

Síðani var farið til sjálvan dystin, sum teir báðir skuldu døma. Eisini her varð fylgt væl við dømingini, áðrenn ein eftirmeting frá øllum pørtum varð gjørd.

Um dømingina sjálva hildu fleiri, at hendan ikki víkti so øgiliga nógv frá tí, sum føroyingar eru vanir at síggja, og sum so man tað bara vera eitt gott tekin. Tað skerst tó ikki burtur, at drúgvu royndirnar hjá dómarunum hava við sær, at teir allan dystin tóktust sera róligir. Hartil høvdu teir eisini sera gott eyga við, nær teir lótu fyrimunsregluna galda, fyri síðani eftirfylgjandi at revsa spælarar, sum høvdu forbrotið seg á reglurnar.

Sunnudagin høvdu vit orðið á Eyðun Samuelsen hjá dómararfelagnum, og hann ivaðist ikki í, at hetta var ein vitjan, sum teir í felagnum høvdu fingið nógv burturúr.

– Hetta eru jú dómarar, sum hava sera drúgvar royndir, og tí kunnu teir sjálvandi læra okkum nakað. Og førleikin fyri hesum verður ikki minni, tá teir báðir hava tikið prógv sum dómarainstruktørar.

Men hvat ítøkiligt kunnu tit brúka slíka vitjan til?

– Fyrst og fremst at menna okkum sjálvar. Tað er ikki soleiðis, at tú nú kanst siga, at føroyskir dómarar eftir hetta dugi eitt ella tvey ávís ting betri. Men tað heldur gongd í eini støðugari menning, og tað er tað, sum vit mugu miða eftir, heldur hann.

– Og so kann eg bara leggja afturat, at vit eru sera fegnir um, hvussu væl eydnað hetta tiltakið var. Teir báðir dómararnir tóktust eisini hava eitt gott vikuskifti, og teir staðfestu, at teir heldur enn gjarna aftur koma á vitjan her hjá okkum, sigur Eyðun Samuelsen at enda.

## GÍ fær málverja úr Birmingham

Mikudagin kemur málmaðurin Craig Johnson til Gøtu at royndarvenja. Sambært heimasíðuni hjá GÍ kemur málmaðurin úr Birmingham, og hann hevur verið knýttur at liðum í bæði Onglandi og Spania.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at ein bretskur málmaður er at finna í Gøtu. Carl Whitehouse royndist gøtumonnum sera væl á sinni.

Í fyrstu atløgu er talan um royndarvenjing hjá Craig Johnson.

-ek

## Jóhann aftur í NSÍ

Jóhann Troest Davidsen, sum er sáttmálabundin í Everton, fer næstu tíðina at spæla við NSÍ. Tað veit NSÍ heimasíðan at siga. Jóhann Troest Davidsen fyllir 18 ár týsdagin. Tá verður hann liðugur við lærutíðina í Everton og verður fulltíðar yrkisspælari.

Jóhann hevur havt lærlingasáttmála við Everton í fjúrtan mánaðir, og tá ið hann týsdagin verður átjan, verður hann bundin at Everton við rættiligum sáttmála.

Jóhann hevur, meðan hann hevur verið lærlingur í Everton, roynt seg í Esbjerg og FC Midtjylland, og nú skal hann altso aftur spæla við NSÍ, sum hann er uppvaksin í. NSÍ heimasíðan sigur einki um, hvussu langt tíðarskeið NSÍ hevur leigað Jóhann Troest Davidsen frá Everton.

-jh